




# Náttarravnar tryggja trygdina

**Komandi vikuskiftið verða fyrstu náttarravnarnir at síggjá á gøtunum. Endamálið við átakinum er at skapa eitt trygt umhvørvi hjá teimum ungu at ferðast í á náttartíð. Mánakvøldið verður borgarafundur, har øll áhugað eru vælkomin**

NÁTTARRAVNAR
*Stefan í Skorini*

Í longri tíð hevur verið tosað um, at foreldur at ungdómi í høvuðsstaðnum fara út á gøtur og stræti at hava eyguni við teimum ungu um náttina. Hesin felagsskapur hevur fingið heitið Náttarravnar. Nú er ísurin endiliga brotin, og teir fyrstu náttarravnarnir verða at síggja í gøtunum leygarkvøldið.

Carl August Arge er ein av fyrireikarunum, og hann sigur, at endamálið við hesum átakinum er at gera tað trygt hjá teimum ungu at ferðast úti á náttartíð.

– Nógv foreldur kenna seg ótrygg, tá børn teirra eru úti seint á nátt, tí tað er ikki altíð trygt hjá teimum. Tað eru eisini fleiri ung, ið ikki kenna seg trygg í havnargøtum, tí tað hava verið einstakir tilburðir, ið hava elvt til ótryggleika, sigur Carl August Arge.

Ætlanin er tó ikki at halda í oyruni á teimum ungu, og tí fara náttarravnarnir at halda seg eitt sindur burturfrá. Teir skulu vera til at heita á, um onkur hevur trupulleikar.


*Erik Thorsted frá tryggingarfelagnum Skandia í Danmark vinstrumegin, Ella Müller í miðjuni og Carl August Arge til vinstru. Tey fara komandi vikuna at skipa fyri skeiðum og fundum, sum hava til endamáls at brynja foreldur til at vera náttarravnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Vilja hava stuðul

Í næstum fer felagsskapurin at heita á privatar fyritøkur um at fáa stuðul til hetta átakið. Tey vóna at møta vælvild, og at tey fáa stuðul ymsastaðni.

Náttarravnarnir fara til verka í tøttum samstarvi við løgregluna, býráðið og barnaverndina.

Í hesum sambandi hava tey fingið hollan stuðul frá tryggingarfelagnum Skandia í Danmark, sum hevur verið við til at stovna 70 slíkar felagsskapir seinastu trý árini. Í Noregi eru eini 350, og har fóru tey í gongd í 1992. Sviar eru undangongumenn á økinum og hava eini 25 ár á baki. Í Grønlandi eru fýra slíkir felagsskapir.

Frá Skandia er Erik Thorsted komin at leggja stigtakarunum lag á. Hann hevur verið við til at stovna slíkar felagsskapir í Danmark. Hansara royndir eru, at hetta er við til at minka um herverk og harðskap millum ung.

Tað hevur víst seg m.a. í Rønne á Bornholm, at kommunan hevur spart nógvan pening, tí talið av herverki er minkað, eftir at náttarravnar hava verið úti á gøtunum. Hann vísir eisini á, at tey ungu hava verið glað fyri, at vaksin tíma at brúka tíð til slíkt.

### Karamellur og hítir

Komandi leygarkvøld fer hetta tiltak av bakkastokki. Tá fara trý vaksin í gulum jakkum, har tað greitt stendur, at tey eru náttarravnar.

Tað hevur verið vanligt hjá Náttarravnunum í Danmark, at tey hava havt karamellur í tí eina lummanum og hítir í hinum. Hetta kann so vera ein máti at fáa samband við tey ungu, um tey sjálv ynskja tað.

Tað er tó fyrst og fremst trygdin, sum skal tryggjast, tá foreldur at ungum fara at ferðast í havnargøtum.

Carl August Arge heldur seg vita, at áhugin millum foreldur at ungum er stórur fyri hesum átakinum. Hann væntar tí góða uppmøting á fundinum í samkomuhøllini í Kommunuskúlanum mánakvøldið 11. november.

# Skeið og fundir

NÁTTARRAVNAR
*Stefan í Skorini*

Í sambandi við at tiltakið Náttarravnar fer av bakkastokki hava stigtakararnir skipa fyri ymsum tiltøkum.

Í kvøld, mánakvøldið, verður almennur borgarafundur í samkomuhøllini í Tórshavnar Kommunuskúla. Her vera umboð frá løgregluni, barnaverndini og Jan Christiansen, borgarstjóri, við á fundinum. Tey fáa bert heilt fáar minuttir, áðrenn Erik Thorsted frá tryggingarfelagnum Skandia fer at greiða frá royndum sínum úr Danmark.

Týskvøldið fer løgregan og barnaverndin at greiða eitt sindur nærri frá teirra arbeiði í hesum sambandi.

Mikukvøldið eigur Skandia alt, sum tað er. Erik Thorsted fer at greiða frá, hvussu náttarravnar eiga at vera, tá teir eru úti í gulu jakkunum. Hóskvøldið luttaka Reyði Krossur og Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.

Fríggjakvøldið verður tann fyrsti royndartúrurin uttan teir gulu jakkarnar, og leygarkvøldið verður farið til verka av álvara.

# Hvannasund og ikki Kunoyarnes

RÆTTING
*Stefan í Skorini*

Í blaðnum leygardagin stóð, at illgruni var um ILA í einum alibrúki við Kunoyarnes. Hetta er komið skeivt fyri, tí talan er um eitt alibrúk hjá Faroe Salmon í Hvannasundi. Vit biðja lesaran um umbering fyri mistakið.

Annars sigur Jón Purkhús, stjóri í Faroe Salmon, at fellið ikki hevur verið so stórt um vikuskiftið, sum tað var í seinastu viku.

Hetta kundi bent á, at talan ikki er um ILA kortini. Enn ber tó einki til at siga við vissu. Úrslitið av royndunum verður væntandi kunngjørt mikudagin, og tá ber til at siga, um talan er um ILA.

Jón Purkhús vísir á, at tað var harður streymur og nógvur vindur inn á sundið í seinastu viku, og tað kann hava verið orsøkin til stóra fellið í tí eina ringinum. Ringurin verður framvegis viðgjørdur, sum um ILA var í honum, tí um so er skal smittan ikki fara víðari til hinar ringarnar í alibrúkinum.

Stjórin vísir framvegis á, at koppseting er einasta svarið uppá trupulleikarnar við ILA, og tað hevði tryggjað framtíðina hjá føroyskari aling.

# Taliban stendur fyri falli

**USA vil hava deildirnar at steðga á, til ein savningarstjórn er skipað.**

Eftir at herdeildirnar hjá Norðursamgonguni í Afghanistan høvdu tikið fleiri týðandi býir um vikuskiftið, gav verjumálaráðharrin hjá samgonguni í gjár sínum monnum boð um at halda leiðina fram ímóti høvuðsstaðnum Kabul.

Samstundis sleptu amerikansk B52-flogfør meira enn 20 sterkum bumbum niður yvir verjustøðirnar hjá Taliban-herinum nakað norðan fyri býin, og sambært amerikanska verjumálaráðnum Pentagon skutu Taliban-hermenninir bara okkurt hissini skotið eftir flogførunum.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, bað um vikuskiftið Norðursamgonguna bíða við at leypa á sjálvan Kabul. Bush segði, at tað er umráðandi at fáa eina savningarstjórn skipaða, áðrenn høvuðsstaðurin verður tikin. Hesum sjónarmiði hava Russland og grannalondini hjá Afghanistan tikið undir við.

### Leypa á

Men Norðursamgongan hevur lítlan hug at bíða. Verjumálaráðharrin hjá samgonguni, Abdullah, segði í gjár, at hansara hermenn fara at leypa á Kabul. Hann segði seg bera ótta fyri, at Taliban fer at taka fólkið í Kabul gíslar, og at tað tí er umráðandi at bera skjótt at.

Tað er heldur ikki líkt til, at umheimurin kann gera stórvegis fyri at steðga átakinum hjá Norðursamgonguni. Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, ásannaði í gjár, at USA og Bretland hava ikki nóg mikið av hermonnum í Afghanistan til at steðga álopinum hjá samgonguni.

# Færri avrættingar í USA

**Tey, sum eru ímóti deyðarevsing, stúrdu fyri tí ringasta, tá George W. Bush tók við sum forseti. Men óttin hevur víst seg at vera ógrundaður, tí altsamt færri brotsmenn verða nú avrættaðir í USA.**

Tað var annars í fjør, at staturin Texas, har Bush var guvernørur, sett nýtt met, tá 40 deyðadømdir brotsmenn vórðu avrættaðir eftir einum ári. Hetta er tað mesta nakrantíð í einum einstøkum stati.

Men bøðlarnir í Huntsville-fongslinum í Texas hava ikki havt so nógv at gera síðani. Fyri nøkrum døgum síðani varð ein fangi avrættaður har, og hann er tann 14. í ár, nú minni enn tveir mánaðir eru eftir av árinum.

Í grannastatinum Oklahoma eru 16 brotsmenn avrættaðir í hesum árinum, men eisini har er vorðið longri millum avrættingarnar.

Gongdin í Texas og Oklahoma er ein mynd av gongdini í øllum USA. Í 1999 vórðu 98 brotsmenn avrættaðir í amerikansku statunum, í fjør var talið 85, og tað er longu greitt, at tað verður munandi minni í ár.

Richard Dieter, sum starvast á einum stovni ímóti deyðarevsing, sigur, at avrættingarnar eru vorðnar færri, tí alt fleiri amerikanarar eru ímóti at taka brotsmenn av døgum. Sambært Richard Dieter eru nógvir amerikanarar farnir at ivast í deyðarevsing, eftir at tað er komið fram, at fleiri fangar eru vorðnir avrættaðir, hóast teir hava verið ósekir.

### Fleiri orsøkir

Tær sonevndu DNA-kanningarnar hava havt við sær, at fleiri eru vorðin fríkend fyri ákærur um morð, samstundis sum myndugleikarnir í nógvum statum eru farnir at leggja størri dent á sinnisstøðuna hjá brotsmonnum.

Samstundis eru myndugleikarnir farnir at taka í egnan barm. Í statinum Arkansas bleiv ein brotsmaður fríkendur, tá tað kom fram, at dómarin, sum hevði felt deyðadómin, var rúsevnismisnýtari. Og í Arizona hevur hægstirættur staðfest, at avrættingar í tí elektriska stólinum eru ómenniskjaligar og harvið í stríð við amerikansku grundlógina.

Altjóða trýst á amerikansku myndugleikarnar hevur eisini gjørt sítt til, at avrættingarnar í USA eru fækkaðar.